# <u>LEIGUSÁTTMÁLI.</u>

Vestmanna Kommuna letur við hesum leigusáttmála **xxxxxxxxx**, fáa til leigu matr. nr. **xx <u>xx</u>**, til víddar **xxx** $m^2$, sí viðheftu kortskjøl frá Matrikulstovuni.

**Gr. 1.**

Leigumálið tekur við **xx. xxxxx 200x**, og kann tá ikki sigast upp av kommununi fyrr enn 3 mánaðar frá tí degi, leigumálið tekur við. Tá hetta tíðarskeið er farið, kann sáttmálin sigast upp av báðum pørtum við einum mánaða varningi til tann 1. í einum mánaða.

Um broytingar ynskjast í leigumálinum, eitt nú at leigumálið verður broytt til vinnugrundøki, skal leigarin skrivliga søkja um hetta, og verður tá nýggjur sáttmáli gjørdur, um eigarin metir, at fyritreytirnar annars eru í lagi.

**Gr. 2.**

Leigan verður goldin eftir tí til eina og hvørja tíð galdandi taksti fyri leigu av uttandura goymsluøki í Vestmanna – í løtuni kr. 15,- fyri $m^2$ árliga – og verður goldin havnarskrivstovuni í Vestmanna.

Leigan verður goldin frammanundan leigumáls byrjan fyri 3 mánaðir, og síðani fyri ein mánaða í senn.

**Gr. 3.**

Økið skal nýtast sum uttandura goymslu- og arbeiðsøki.

Økið má ikki, uttan skrivligt loyvi er fingin frammanundan frá eigaranum, nýtast til annað endamál enn tað, sum nevnt er í 1. stk.

Um leigarin ikki innan ein mánaða frá leigumáls byrjan hevur tikið økið í brúk, fer leigumálið úr gildi.

Eigarin skilar sær rætt til at siga leigumálið upp við einum mánaða varningi til tann 1. í einum mánaða, um leigarin nýtir økið til annað endamál enn við byrjan av leigumálinum.

**Gr. 4.**

Leigarin skal til eina og hvørja tíð syrgja fyri, at økið verður væl umgingið og hildið ruddiligt.

Oljuúrdráttir ella oljudálkaðir lutir skulu undir ongum umstøðum koma inn á økið.

Metir eigarin, at leigaða økið er illa umgingið og óruddiligt, kann eigarin geva boð um rudding.

Verða hesi boð ikki fylgd innan eina ásetta freist, skilar eigarin sær rætt til at siga leigumálið upp við einum mánaða varningi til tann 1. í einum mánaða, og eigarin skilar sær somuleiðis rætt til fyri leigarans rokning at rudda tað leigaða økið, uttan at eigarin skal kunna krevjast eftir endurgjaldi í samband við møguliga burturbeining.

Eigarin kann krevja, at økið verður innigirt.

**Gr. 5.**

Leigan skal verða goldin havnarskrivstovuni í seinasta lagi 15 dagar innan frammanfyri settu gjalddagar.

Verður leigan ikki goldin sum ásett, kann Vestmanna Kommuna siga leigumálið upp við 1 mánaða varningi.

Verður leigan goldin, áðrenn uppsagnartíðin er úti, fellur uppsøgnin burtur.

Er uppsagnartíðin farin, uttan at leigan er goldin, kann kommunan krevja vanlig rættarstig fyri, at tilfar, útgerð o.l., sum er á tí leigaða økinum, verður sett til tvingsilssølu, og annars at rudda økið fyri leigarans rokning.

**Gr. 6.**

Eldfimar vørur, so sum spreingievni, bensin, petroleum o.a., eiga ikki at verða goymdar í størri nøgdum á tí leigaða økinum.

Leigarin skal altíð fylgja teim reglum, sum bruna- og heilsuvald fyriskipa, og er hann skyldugur at endurgjalda allan skaða, sum Vestmanna Kommuna kemur undir, og sum stendst av, at hesar reglur ikki eru fylgdar.

**Gr. 7.**

Verður tilfar, útgerð o.l. á tí leigaða økinum oytt av eldsbruna, spreinging ella líknandi vanlukku og økið ikki tikið í brúk aftur, innan ein mánaði er umliðin, hava báðir partar rætt til at siga leigumálið upp við einum mánaða varningi, og skal leigarin tá lata økið aftur í sama standi, sum við leigumáls byrjan.

**Gr. 8.**

Vestmanna Kommuna hevur rætt til at leggja leiðingar til vatn, ravmagn o.l. um tað leigaða økið, men má hetta tarna leigaranum sum minst í nýtsluni av økinum.

**Gr. 9.**

Verða partarnir ósamdir um, hvussu sáttmálin er at skilja ella um annað sáttmálanum viðvíkjandi, er niðurstøðan hjá eigaranum galdandi.

**Gr. 10**

Økið skal, tá ið leigumálið heldur uppat, verða latið aftur í sama standi, sum við leigumáls byrjan, tvs., at økið skal verða latið aftur slættað og ruddað. Verður hetta ikki gjørt, hevur kommunan rætt til at lata økið rudda fyri leigarans rokning uttan at honum er loyvt at mótmæla móti kostnaðinum.

**Gr. 11.**

Hesin sáttmáli verður gjørdur í 2 eintøkum, og fær hvør parturin sítt eintak.

Vestmanna, tann

Sum eigari:

vegna Vestmanna Kommunu

Vestmanna, tann

Sum leigari:

vegna **xxxxxxx**